# H E I L S U F R Ø Ð I L I G A   S T A R V S S T O V A N

virkir/skip

Tórshavn, hin 26. mars 2010
Málnr.: 403-201000271-2
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: LSJ / Tlf.: 55 64 19

**Matvørudeildin**

## Umsókn um loyvi at útflyta fisk og fiskavørur til Russlands

Heilsufrøðiliga starvsstovan (HFS) undirskrivaði hin 15. januar 2008 samstarvsavtalu við veterineru myndugleikarnar í Russlandi. Avtalan staðfestir mannagongdir og treytir í sambandi við føroyskan útflutning av fiski og kjøti til Russlands.

HFS hevur í avtaluni fingið litið til at gera ein lista við virkjum (og skipum), sum ynskja at útflyta til Russlands. Virki, ið HFS setir á Russlandslistan, skulu verða innrættað og skulu framleiða í samsvari við russiskar, heilsufrøðiligar reglur. (Russisku reglurnar eru at finna á www.hfs.fo). HFS hevur ikki heimild at handhevja russiska lóggávu í Føroyum. Í teimum førum virkini ikki lúka russisku treytirnar, hevur HFS skyldu til, sambært avtaluni, at taka virkini av Russlandslistanum.

Øll virki í Føroyum, sum framleiða fisk og fiskavørur, skulu lúka føroyska lóggávu. Virkini, sum eru á Russlandslistanum, skulu sostatt lúka bæði føroyska og russiska lóggávu.

Virki (skip), sum ætla at útflyta til Russlands, mugu hava kontraktir við russiskar innflytarar. Virki, sum ikki hava samband við russiskan innflytara, verða ikki góðkend av Rosselkhoznadsor.

HFS ætlar javnan at fáa dagført listan við føroyskum virkjum/skipum og sent hann til góðkenningar hjá Rosselkhoznadsor. Virki/skip, sum ynskja at útflyta til Russlands, skulu senda HFS eina umsókn við upplýsingunum, sum standa í *fylgiskjali 1*. Umsóknin má vera okkum í hendi í seinasta lagi ______________________________. Álagt verður virkjum/skipum at seta seg inn í russiska lóggávu og sjálvt regluliga at eftirkanna viðurskiftini í fylgiskjali 2 og 3. Gerast skal vart við, at í sambandi við útflutning til Russland eru serlig krøv til kanningar. Kanningarnar eru fyri sníkar, sensorik, bakteriur og kemisk dálkingarevni. Krøvini til kanningar síggjast í fylgiskjali 4.

HFS viðger umsóknirnar og kemur á eftirlitsvitjan á virkinum/skipinum. Á eftirlitinum verða m.a. viðurskiftini í fylgiskjali 2 og 3 eftirkannað. Harumframt skulu virkini/skipini hava sett kanningar í fylgikjalið 4 í verk. Virkini/skipini fáa síðani fráboðan um niðurstøðuna, og listin við virkjum/skipum, sum HFS metir lúka treytirnar, verður sendur Rosselkhoznadsor.

Í avtaluni stendur, at russisku myndugleikarnir skulu hava maksimalt 30 dagar at góðkenna listan og síðani maksimalt 2 vikur at fráboða sínum marknaeftirlitsstøðum.

Eru ivamál, so lat okkum frætta.

Vinarliga

Laila S. Jacobsen
Deildarleiðari

PS. Fylgiskjal 1 og 4 er tøkt elektronskt á www.hfs.fo undir umsóknir og oyðibløð, Russland

Journalnr.: 403-201000271-2

**Fylgiskjal 1**
Útflyllingarskjal til umsókn um loyvi at útflyta fisk og fiskavørur til Russland

Lýsing av ætlaða útflutninginum til Russland

Útfyll niðanfyristandandi talvu:

| Uppskot til Rosselkhoznadsor um lista yvir fiskavirki og verksmiðjuskip, innstillað av føroysku Heilsufrøðiligu starvsstovuni, at útflyta fisk og fiskavørur til Russlands | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Utgáva | | | Dagfesting 09.2009 | | | |
| Nr. | Navn, nr. á virki (skipi) | Slag av vøru | Upprunaland | Árlig framleiðsluorka | Nøgd á sølu til Russlands | Navn á innflutningsfirma í Russlandi |
| | | | Nummar á virki/rávøru | (tons) | (tons) | Name, INN number, Address |

Tit vera biðin um at taka elektroniska skjali (exell) av www.hfs.fo undir umsóknar og oyðubløð, Russland, “Útflyllingarskjal til umsókn um loyvi at útflyta fisk og fiskavørur til Russland” og útfylla skjali og senda inn elektroniskt á hfs@hfs.fo.

**Fylgiskjal 2**
Fyri at virki skal fáa undirskriva heiluváttanir til Russlands, skulu niðanfyri nevndu viðurskift vera í lagi.

| Heimild | Russiskt frávik | 1* | 2* | 3* | HS viðmerking |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Samskifti við HS tøkt**<br>**Løggildingarskjal**<br>**IEgóðkenningarskjal** | | | | |
| RU Heilsuváttan<br>-<br>- | **Russisk lóggáva tøk**<br>**Kennur virki lóggávuna**<br>**Skoða um tey lúka RU** | | | | |
| -<br>-<br>-<br>- | **RU markvirðini tøk**<br>**Kennur markvirðini**<br>**Lúka RU markvirðir**<br>**Fyriliggja úrslitini** | | | | |
| -<br>- | **Eftirlit við sníkum**<br>**Svíkar lýstir í GH** | | | | |
| - | **Loyst innseglingina** | | | | |
| | **Útistandandi krøv**<br>**Freistirnar falnar** | | | | |

*** 1 = nøktandi 2 = ávegis 3 = als ikki nøktandi**

**Fylgiskjal 3**
**Frávik staðfest á føroyskum virkjum av russiskum eftirlitsfólkum – mai 2008      1 = nøktandi   2 = ávegis        3 = als ikki nøktandi**

| Nr. | **Føroysk heimild** | **Russisk heimild** | **Russiskt frávik** | **1** | **2** | **3** | **HS viðmerking** | **virkisins frágreiðing** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | §19 | 3.3.4 og 3.3.5 | Rensli av vøur gjøgnum framaleiðsluna í lagi – minus mótsatt rensl krossast?<br>Fullur skilnaður millum reint og skiti øki ? | | | | | |
| 2 | §17 og §58 | 3.2.1, 3.2.3-5 og 3.2.10 | Uttanumsøki  nøktandi,<br>burturkast,<br>inngirðing? | | | | | |
| 3 | § 19, § 59 | 3.6.14, 3.6.15, 5.10, 5.11 | Eru slúsur og sjálvrøkt nøktandi? | | | | | |
| 4 | §19,2 | 3.2.4, 3.2.9, 3.2.12 | Heilsufrøðiligu viðurskiftuni á smiðum o.l. nøktandi? | | | | | |
| 5 | | | Heilsufrøðiligu viðurskiftini á virkjinumn: | | | | | |
| 6 | §46,1 | 3.7.1 | Er framleiðsluútgerð rustað? | | | | | |
| 7 | 26-79 | 3.3.17-19 | Eru veggi og loft nøktandi (ikki úr træ) | | | | | |
| 8 | 46 | | Onnur útgerð í reinførum standi | | | | | |

| Nr. | Føroysk heimild | Russisk heimild | Russiskt frávik | 1 | 2 | 3 | HS viðmerking | virkisins frágreiðing |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9 | 33,2 | 3.5.2-4 | Eru skermar um lampur? | | | | | |
| 11 | 23 | 3.3.12 | Eru gólv heilt? | | | | | |
| 12 | 24 | 3.3.12 | Eru ristir rustaðar? | | | | | |
| 13 | §80,1 | | Er frostgoymslan tilísað? | | | | | |
| 14 | | | Er øll vøra í frostgoymslu innpakkað? | | | | | |
| 15 | §59 | 5.10 og 3.3.27 | Er eftitliti við sjálvrøkt nøktandi? | | | | | |
| 16 | | | Hevur virki eitt sjónligt innaneftirlit? | | | | | |
| 17 | 55 | | Er eftirliti við skipaðari sóttreinsing nøktandi? | | | | | |
| 18 | §68,2 | | Eru innvølsrestir á fiskinum? | | | | | |
| 19 | §22 | 3.2.8 | Er øki til vask av flutningstólum? | | | | | |
| 20 | | | Stendur liðugtpakkaður fiskur ov leingi uttanfyri køl? | | | | | |

**Fylgiskjal 4**
Vegleiðing um hvørjar kanningar skulu gerast og hvussu oftani sýnini skulu takast.

**Vegleiðing um hvørjar kanningar skulu gerast og hvussu ofta sýnir skulu takast.**

Virkir og skip, sum eru góðkend til at standa á Russlandslistanum, skulu hvørt kvartal senda mikrobiologisk kanningarúrslit og histamin kanningar inn til Heilsufrøðiligu starvsstovuna. Kemisk kanningarúrslit skulu seinast inn eina ferð árliga. Stýring við síkum og sensoriskum kanningum skal verða tøk, tá vanlig eftirlitsvitjan er.

Hetta skjalið liggur tøkt á heimasíðuni hjá www.hfs.fo.

Kanningarúrslit fyri eitt kvartal skulu í seinasta lagi verða sent inn til Matvørudeildina hjá HFS eina viku inn í næsta kvartal. Tað er ábyrgd hjá virkinum/skipnum at senda sýnir til kanningar, soleiðis at úrslitini eru tøk til ásettu tíðarfreist.

Hjálagt hesum excel arki eru skema at fylla út, tá kanningarúrslitini verða send inn. Tá úrslitini verða tastað inn, er tað umráðandi, at nummarið á sýnisseðlinum eisini er viðmerkt. Avrit av sýnisseðlinum skal eisini sendast við.

***5 sýnir skulu kannast hvørt kvartal fyri mikrobiologi***
***1 sýni fyri histamin, tá tað er laksur***
***9 sýnir fyri histamin, tá tað er sild ella makrel***
***Kemiskar kanningar skulu gerast eina ferð um árið.***

Hetta er bara galdandi, um kanningarúrslitini eru innanfyri ásett markvirðir.

**Tá HFS hevur móttikið nøktandi kanningarúrslit, tvs. at hjálagt skema er útfylt og avrit av kanningarúrslitunum er sent til HFS hvørt kvartal, kunnu virkini fáa heilsuváttan.**

Eru ivamál um, hvussu hetta skal gerast, kunnu til ringja til tykkara málsviðgera á Matvørudeildini, HFS.

**Fylgiskjal 4 (framhald)**

# Mikrobiologisk kanningarúrslit

5 sýnir skulu kannast av hvørjum vøribólki hvørt kvartal, sýnini skulu takast um somu tíð.
Niðanfyri standandi markvirðir eru frá russisku lóggávuni (punkt 2.3.2).

**Upplýsningar um hvønn vørubólk:**

| | |
|---|---|
| Fiskaslag | |
| Vørubólkur | |
| Framleiðsludagur | |

| **Kanning** | **Markvirðir** | **Úrslit** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Sýnisseðil nummar* | | | | | | |
| Samla tal av bakterium | < 500.000/g | | | | | |
| Fecal coliform | <100/g | | | | | |
| Staphylococcus aureus | <100/g | | | | | |
| Salmonella | not present in 25 g | | | | | |
| Listeria monocytogenes | not present in 25 g | | | | | |

Elektroniska skjali (exell) er tøkt at seta úrslitini inn í á www.hfs.fo undir umsóknar og oyðubløð, Russland. Skjali kallast kanningar.

Á elektroniska skjalinum er pláss fyri fleiri vørubólkum.

**Fylgiskjal 4 (framhald)**

## Kanningarúrslit fyri Histamin

1 histamin sýni skal gerast av laksi hvørt kvartal.

9 histamin sýni skulu gerst av sild.

9 histamin sýni skulu gerast av makrel.

Øll sýnini skulu takast um somu tíð. Av teimum 9 sýnunum, kunnu tvey av teimum liggja millum 100 og 200 mg/kg, hini 7 skulu liggja undir 100. Onki úrslit má liggja yvir 200. Sambært Kunngerð 9, mikrobiologisk metingarstøði fyri matvørur, bilag 1, kap.1 punkt 1.26. Sambært russisku lóggávuni (punkt 2.3.2) skulu øll virðir liggja undir 100 mg/kg.

## Upplýsningar um sýnið:

| | |
|---|---|
| Fiskaslag | |
| Hvar og nær er hann fiskaður | |
| Dato | |

| **Sýnisseðil nr.** | Histamin (mg/kg) |
|---|---|
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |

Elektroniska skjali (exell) er tøkt at seta úrslitini inn í á www.hfs.fo undir umsóknar og oyðubløð, Russland. Skjali kallast kanningar.

Á elektroniska skjalinum er pláss fyri fleiri vørubólkum.

**Fylgiskjal 4 (framhald)**

# Kemisk kanningarúrslit

Hvørt fiskaslag, sum er ætla at útflyta til Russlands skal kannast eina ferð um árið fyri tungmetallir og lívrunninevnir.

Niðanfyri standandi markvirðir er frá kunngerð 147 um áseting av markvirðum fyri ávís dálkandi evni í matvørum, kp 3. og frá russisku lóggávuni (punkt 2.3.2).

**Upplýsningar um sýnið:**

| | |
|---|---|
| Fiskaslag | |
| Stødd á fiskinum | |
| Hvar og nær  er hann fiskaður | |

| **Kanning** | **Markvirðir mg/kg** | | **Úrslit mg/kg** | **Sýnisseðils nummar** |
|---|---|---|---|---|
| | **RU** | **FO** | | |
| ***Toxic elements*** | | | | |
| Lead, Pb | 1 | 0,2 | | |
| Arsenic, As | 5 | | | |
| Cadmium, Cd | 0,2 | 0,05 | | |
| Mercury, Hg | 0,5 | 0,5 | | |
| ***Pesticides*** | | | | |
| Hexachlorcyclohexan (HCH) | 0,2 | | | |
| DDT and its metabolites | 0,2 | | | |
| Polychloride biphenyls (PCB) | 2 | | | |

Elektroniska skjali (exell) er tøkt at seta úrslitini inn í á  www.hfs.fo undir umsóknar og oyðubløð, Russland. Skjali kallast kanningar.

Á elektroniska skjalinum er pláss fyri fleiri vørubólkum.